tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 201 Fríggjadagur 18. oktober 1996 70. árgangur Krónur 7,00

## Ein súla býr úti á Reyni í Havn



*John Johannesen, sum býr úti á Reyni í Havn er góður við Kriatúr. Hann hevur fingið ein súluunga til fosturs. – Eg eri so góður við kri-atur og vóni ikki, at nakar fer at gera honum ónáðir, sigur John.*

**Síða 22**

*Edvard Nyholm Debes:*



## Rimmar-jazzur er 77% ide-alisma

**Síða 11**

***Skuldsettu leirvíksingarnir:***

# Nokta seg sekar í manndrápi

*Teir báðir ungu leirvíksingarnir eru nú varð-haldsfongslaðir, meðan løgreglan kannar málið*

**Síða 3**



Mynd: Kalmar

*Løgreglan fjaldi teir báðar skuldsettu menninar undir tepp-um, tá teir vórðu førdir úr rættinum í geglið*

# Politikararnir mugu kunna seg um vinnuna

*– Um stutta tíð skulu føroysku politikararnir taka støðu til eina oljulóggávu. Eg skilji tí ikki, hví teir ikki vilja verða kunnaðir um oljuvinnuna, sigur Pauli Einarsson, formður í Føroya Oljuídanði, sum eisini er bangin fyri at menningin á økinum er við at yvirhála okkum.*

**Síða 8-9**

***Marita Petersen:***



## Viðurskiftini við Danmark skulu greiðast

**Síða 5**

# Lógbók fyri Føroyar

Lógbók fyri Føroyar 4. bind er nú prentað og til sølu. 4. bind hevur 912 síður.

Lógbókin er býtt upp í 32 partar, ið eru teir somu sum í »Lovregister for Færøerne« og »Dansk Lovregister« og fevnir um alla galdandi lóggávu í Føroyum, bæði innan sermál og felagsmál.

Bind 1 fevnir um partarnar 1-9, bind 2 partarnar 10-21 og bind 3 partarnar 22-27.

Bind 4 fevnir um partarnar 28-32.

28. Heilsuverk, Heilivágur, Sinnisbrek
29. Siglingar, Strand, Havnir, Kavarar
30. Tænastumenn v.m.
31. Uttanríkistænasta, Millumtjóða viðurskifti
32. Hjúnalag, Børn, Løgræði, Navn, Skrásetan, Grunnar, Yvirverjustovnurin

Við 4. bindi fylgir eitt evnisyvirlit til bindini 1-4.

Bind 4 fæst - eins og bindini 1-3 - til keyps í bókahandlunum. Prísurin fyri 4. bind og evnisyvirlitið er 460 kr. tilsamans.

# Kríatúrini mugu vit verja

RANDI JACOBSEN

John Johansen á Reyni í Havn hevur ein fugl, sum ikki er vanligur at hava heima.

Nógv fólk hava lagt leiðina fram við hjá John hesar dagarnar at síggja henda sjáldsama fuglin í býnum.

Tað er ein súluomnil, ið er sum ein gás til støddar.

Ikki hevur John ella nakar annar tikið henda omnil bara fyri at hava hann.

Tá súlurnar fara av fokini, sita ofta fleiri av ungunum eftir, tí teir klára ikki sjálvir at flúgva, serliga tá teir eru seint klaktir. Og so doyggja teir í hungri.

Onkur hevði tikið synd í hesum omnlinum, sum kom til Sørvágs, og haðani fekk John hann fyri viku síðan.

Teir fyrstu dagarnar hevði hann omnilin inni, men nú hevur hann sitið úti, og har situr hann friðarligur allan dagin. Tá tað verður kaldari, væntar John, at hann tekur fuglin inn aftur.

John gevur honum seið og makrel, og væl glíður niður. hann er spakur og letur, tá hann sær John.

Hvat verður av omnlinum, veit John ikki. Fuglurin sleppur ikki á flog á slættum og fer tí ongan veg.

— Eg tók hann, tí eg havi altíð verið so góður við kríatúr og fekk meg ikki til at drepa hann. Vit eiga at vera góð við kríatúrini, og eg vóni ikki, at nakar kemur og ger hesum ónáðir, sigur John.



*John við sínum nýggja vini.* ***Mynd: Kalmar***


**Frá PIZZARIA**

*Nýggjur og størri matseðil!*

Vinarliga bíleggið borð í góðari tíð.

Minnist til heimkoyringartilboðið!

**PIZZARIA · Tlf. 18866**


***Framhald av síðu 9***

fyritekur sær. Og nettup her er tað so týdningarmikið, at politikarnir vísa málinum áhuga og kunna seg við tað.

### Tíðin við at ganga undan

Pauli Einarsson sigur víðari, at tíðin er við at ganga undan, nú tað bert er eitt ár til 1. lisensrunduna á føroyskum øki. – Tí er tað síðsta útkall nú. Oljufeløgini eru sum er longu sera áhugað at brúka føroyska arbeiðsmegi, men vit kunnu koma hartil, at tey fara at spyrja, hvat arbeiðsmegin er.

Hetta er ein støða, sum oljufeløgini sjálvi eru greið yvir, og nettup tí vilja tey vera við til at útbúgva føroyingar, soleiðis at teir eru klárir, tá oljuvinnan av álvara byrjar í Føroyum.

Pauli Einarsson heldur hetta vera eitt sera positivt samanspæl og metir hann ikki nakran politikk vera uppi í hesum.

Hetta er so eisini ein av orsøkunum til, at eg sum formaður í Føroya Oljuídnaði havi verið hjá Vinnunevndini í løgtinginum og spurt, um hon er hugað fyri at fara av landinum og við egnum eygum og oyrum fáa eina fatan av, hvussu oljuvinnan er bygd upp og virkar aðrastaðni.

Pauli Einarsson sigur seg hava varhugan av, at limirnir í nevndini vilja fegnir hava meira at vita, áðrenn tann stóri lóggávupakkin verður lagdur á tingborð.

### Ynskir vinnumálastjóra vælkomnum

Vit spurdu formannin í FOI, hvat hann heldur um ætlaðu bygnaðarbroytingarnar í landsstýrinum, har tað skjótt fer at verða settur ein vinnumálastjóri, sum skal hava undirgrundarmál sum sítt málsøki?

Tað kann bara vera gott. Tí tá nýtist tú ikki alla tíðina at brúka Føroya hægsta mann, løgmann til alt samskiftið, sum er millum oljuheimin og so føroyskar myndugleikar.

Tað kann oftani verða óheppið, tí tað er nógv, sum tú ikki kanst tosa við ein løgmann um. Eg meti, at tað hevur nógv at siga fyri bæði føroyingar og útlendingar, at hesi málini verða skild sundur sigur formaðurin í Føroya Oljuídnaði, sum vónar, at politikararnir og politiska skipanin í Føroyum rakna við og innsíggja, at verða teir ikki meira virknir í oljumálinum longu nú, so fer útviklingurin at yvirhala okkum, og vit sita eftir við Svartapetri.



*Pauli Einarsson hevur roynt at kunna seg við oljuvinnuna við at vera á oljuráðstevnum sum hesari í Stavanger, har norski konkurin júst hevur sett stevnuna. Mynd: jan*





Nýggir haldarar kunnu tekna seg á ... kring landið, ella við at venda sær til tel 11820 ella e-mail: sosialur@ olivant.fo